# Várkonsert við Tórshavnar kamarkóri

Várkonsert við Tórshavnar kamarkórið við Kára Bech sum leiðara, verður í Gøtu kirkju hóskvøldið klokkan 20 og í Havn leygardagin klokkan 17 í Komunuskúlaskálanum. Framførdir verða sangir eftir Johannes Brahms, umframt onkran føroyskan og svenskan.



# Meiri pengar úr ferðafólki

Grønlendingar eiga ikki at sita hendur í favn og at lata danskar ferðaskrivstovur taka sær av at senda tey stóru ferðamannaskipini á rundferð til Grønlands. Tað arbeiðið eiga grønlendskar ferðaskrivstovur at gera. Aleqa Hammond, landsstýriskvinna, sum júst hevur verið á fundi í USA, sigur, at í Alaska hevur ferðavinnan havt sera stóra framgongd, og at grønlendingar mugu læra at fáa meiri burtur úr teimum fremmandu ferðamannaskipunum.

# Nýggj føroysk vinnuskrá ávegis

**Í løtuni verður seinasta hond løgd á eina spildurnýggja føroyska vinnuskrá, har øll føroysk parta- og smápartafeløg hava høvi at sýna fram sínar vørur og tænastur**

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Vinnuportalurin Business-line, www.bl.fo verður í løtuni endurnýggjaður og kemur helst seinnapartin í dag út í nýggjari og broyttari útgávu.

– Business-line hevur sum kjarnutænastu at verða ein sterkur og álítandi veitari av roknskapartølum og -greiningum av ymiskum slagi, sigur Finnur Sivertsen, stjóri á Business Line.

– Stóra broytingin í hesi útgávuni í mun til aðrar er tann, at vit nú uppraðfesta okkara vinnuskrá og gera hana almenna. Sostatt sleppa øll nú inn í henda partin í skipanini, sigur Finnur Sivertsen.

Skalt tú hava atgongd til roknskapirnar er tó neyðugt at rita inn í skipanina, men tú fært allar aðrar upplýsingar um feløg uttan at rita inn.




*Nýggi vinnuportalurin hjá Business-line er munandi broyttur. Kjarnutænastan er roknskapartøl – men nú fáa øll høvi at síggja vinnuskránna uttan at rita inn í skipanina*

**Áhugavert marknaðarpláss**

Tey á Business-line hava lagd stóran dent á, at feløgini við eini virkislýsing fáa góðan møguleika at sýna fram sínar vørur og tænastur, og at hesar verða lættar at finna hjá brúkarum. Feløgini skriva sjálvi sína virkislýsing, sum so verður løgd inn á síðuna saman við upplýsingunum um virkið.

– Á henda hátt skapa vit eitt áhugavert marknaðarpláss, har seljari og keypari hittast, sigur Finnur Sivertsen, búskaparfrøðingur og stjóri á Business-Line.

Í komandi bløðum fara vit at hyggja nærri uppá nýggju skipanina hjá Business-line.



Móttøkufólk og bilmekanikarar

Til verkstað okkara sóknast vit eftir einum móttøkufólki og tveimum bilmekanikarum.

Móttøkufólkið skal hjálpa verkstaðsleiðaranum í dagliga arbeiðinum. Arbeiðsuppgávurnar fevna millum annað um móttøku av viðskiftafólki, innskriving og um skráseting av uppgávum. Umráðandi er, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur tekniska fatan. Kunnleiki til bókingarskipanina Navision er eisini ein fyrimunur.

Bilmekanikararnir mugu vera útlærdir á góðkendum verkstaði. Lætt lyndi, ágrýtni og nærlagni hava samstundis avgerandi týdning í dagliga arbeiðinum.

Vit leggja stóran dent á gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Hinvegin krevja vit av starvsfólkum okkara, at tey kunnu arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tey eru partur av einum toymi, har aðalmálið er valaverk til ein nøgdan skara av viðskiftafólki.

Lønar- og setanartreytir eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Jens á Skipagøtu á tel 239700.

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. mai.

SENDISTOVAN

Audi SEAT mazda

Bilasølan
Vegurin langi · Postsmoga 3192 · FO-110 Tórshavn
Tel 359700 · bilasolan@bilasolan.fo

# Trøllaomman stjól ein buss

**Trøllaomman hevur stjolið ein buss, sum hon fekk børnini í Margitar Barnagarði í Klaksvík at hjálpa sær at mála**

TRØLL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Til jóla kemur ein nýggjur filmur um Trølla Pætur og Trølla Ommuna. Tey er í ferð við upptøkurnar nú.

- Hesaferð verða allar upptøkurnar gjørdar í Føroyum, og hesin bussurin verður ein høvuðspallur í filminum, sigur Niclas Heri Jákupson, høvuðsmaður í verkætlanini.

- Børnini í Margitar Barnagarði í Klaksvík hava hjálpt okkum at mála bussin, sum er rættiliga pedagogiskur. Á aðrari síðuni hava tey málað tøl uppá, hinum megin bókstavaraðið. Aftan fyri á bussinum er ein klokka, sigur Niclas Heri Jákupsson, sum leggur dent á, at børnini skulu hava gleði av bussinum.

Bussurin verður kortini ikki bara brúktur í filminum, tí komandi vikuna fer hann at koyra runt við Bassa hjá Eik Banka í sambandi við føðingardagin hjá Bassa.

Tað er Zacharis Hammer, sum stendur fyri upptøkunum av nýggja Trølla Pætur filminum.



*Hesin bussurin verður at síggja kring landið komandi tíðina, at hann skal gleða børnini. Bussurin er eisini ein høvuðspallur í nýggja Trølla Pætur filminum, sum kemur til jóla*